Kopisíður

# Putlisøgur

# PUTLISØGUR

Putlisøgur er eitt hugskot um, hvussu vit kunnu arbeiða við teksti, har vit fara frá heildini niður í smálutirnar, og síðan aftur til heildina.

Vit hava valt at gera nakrar putlisøgur úr tekstinum í *Súluni*, men tað ber sjálvandi væl til at nýta annan tekst, sum er viðkomandi fyri børnini. Eitt gott hugskot er at skriva um børnini og teirra verð. Havast skal í huga, at teksturin má vera lættur og ljóðrættur í mest møguligan mun.

Vit tosa við børnini um, hvat ein setningur er, og siga teimum, at vit nýta ymisk tekn, tá ið vit skriva tekst.
Í setningum byrja vit altíð við stórum bókstavi og enda við punktum, spurnartekni o.ø.
Í okkara putlisøgum endar søgan altíð við punktum. Á sama hátt, sum tú leggur kantarnar í putlispølum fyrst, leggja vit í putlisøguni byrjan og enda fyrst.
Síðan leggja vit orðini, sum eru inni í setninginum.

Tað er tilskilað á bókstavasíðunum í læraravegleiðingini, hvørjar bókstavir vit hava gjørt putlisøgur til. Ætlanin er tó ikki, at vit *skulu* arbeiða við putlisøgunum, tá ið vit hava tann ávísa bókstavin, men at lærarin arbeiðir við teimum, tá ið tað hóskar seg best í undirvísingini.

Putlisøgur eru góðar at brúka í *serundirvísingini*. Við tað at vit fara frá heildini niður í smálutirnar og aftur til heildina, ber væl til at arbeiða við hugtøkum, orðum, bókstavum og ljóðum. Myndirnar eru góðar at práta um, og innihaldið verður kent fyri børnunum.
Áðrenn putlisøgan er klipt sundur, vita børnini, hvat søgan er um, tey duga at lesa tekstin sum eina samanhangandi søgu. Men í tí løtu, vit hava klipt søguna sundur, má barnið týða hvørt orðið sær, finna út av, hvørjum bókstavi orðið byrjar við, hvør næsti bókstavur er, o.s.fr.

Hetta skulu vit brúka: eitt hefti, saks, límstift

## Mannagongd

1. Vit práta um myndina. Lærarin ansar eftir, at tey orð, sum eru í tekstinum, verða nevnd. Meðan vit práta, kunnu vit skriva nøkur orð á sjálva myndina. Hesi orð stuðla barninum, tá ið søgan skal setast saman aftur.

2. Áðrenn søgan verður klipt sundur, lesa vit tekstin, møguliga fleiri ferðir. Tá ið vit arbeiða við børnum, sum hava trupult við lesing, mugu vit gera okkum meira ómak við tí fyrireikandi arbeiðinum. Vit tosa um orð, bókstavir og ljóð.

3. Børnini klippa myndina út og líma hana í heftið.

4. Børnini klippa orðini í køssunum sundur og blanda tey. Orðini liggja nú sum eitt putlispæl á borðinum.

5. Orðini verða sett saman aftur, byrjan og endi fyrst. Tá ið setningurin liggur rætt samansettur á borðinum, líma vit orðini í heftið.



| | | |
|---|---|---|
| Sólin | sá, | ein |
| mús | lá | í |
| á. | | |




| | | |
|---|---|---|
| Sólin | sá | ein |
| grís | eta | rís |
| og | ís. | |



| | | |
|---|---|---|
| Ein | ketta | sá |
| eina | mús | á |
| tá. | | |




| | | |
|---|---|---|
| Sólin | sá | eina |
| il | og | ein |
| fisk | og | ein |
| bil. | | |



| | | |
|---|---|---|
| Sólin | sá | ein |
| krabba | bíta | í |
| eina | tá. | |

PUTLISØGUR 6 - Gg



| | | |
|---|---|---|
| Her | er | eitt |
| egg, | sum | hevur |
| skegg. | | |

PUTLISØGUR 7 - Rr



| | | |
|---|---|---|
| Ein | risi | sá |
| trý | ross | og |
| ein | foss. | |




| | | |
|---|---|---|
| Ein | úla | og |
| ein | súla | eru |
| í | skúla | og |
| lesa | um | ú. |




| | | |
|---|---|---|
| Timm | og | Tomm |
| eta | bomm, | grøn |
| og | gul | og |
| blá. | | |




| | | |
|---|---|---|
| Í | Afrika | er |
| apan | Affi, | ananas |
| banan | og | kaffi. |




| | | |
|---|---|---|
| Ein | likka | lesur |
| í | bók | um |
| kráku, | sum | er |
| so | klók. | |




| | | |
|---|---|---|
| Dunnan | Dina | etur |
| rís | og | býr |
| í | Kina. | |



| | | |
|---|---|---|
| Á | eini | ong |
| sá | eg | ein |
| kong | í | eini |
| song. | | |

PUTLISØGUR 14 - Pp



| | | |
|---|---|---|
| Hipp | og | Hopp |
| fáa | poppkorn | í |
| ein | kopp. | |

PUTLISØGUR 15 - Ýý





| | | |
|---|---|---|
| Leika | fór | at |
| ýla, | tá | inn |
| kom | ein | grýla. |





| | | |
|---|---|---|
| Sólin | sá | Eyð |
| og | ein | seyð |
| eta | breyð. | |



| | | |
|---|---|---|
| Eg | fór | heim, |
| tá | ein | dropi |
| datt | á | mín |
| fína | hatt. | |

PUTLISØGUR 18 - ei



| | | |
|---|---|---|
| Eg | breyt | beinið, |
| tá | eg | datt |
| av | einum | steini. |